gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðadeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Takið av oljuavgjaldið!

## *Oddagrein*

OLJUAVGJALDIÐ er nú 22 oyru hægri fyri hvønn litur enn tað var, tá løgtingið í vár samtykti at broyta útrokningargrundarlagið. Tað merkir, at hvørt einstakt húski skal í dag gjalda 220 krónur meira fyri at fylla 1000 litrar á tangan. Við øðrum orðum var avleiðingin frá broytingini, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, skeyt upp, einki annað enn ein fjald skatta- og avgjaldshækking.

HETTA var ikki ætlanin, sigst! Men sambært útvarpinum vil landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum ikki gera nakað við henda spurningin, sum fyrst og fremst tyngir um hjá vanliga føroyinginum. Hjá pensjónistum og láglønarbólkum – vanligum verkafólki – sum Tjóðveldisflokkurin áður umboðaði, bæði í orði og í verki.

FERÐ eftir ferð spyrja fólk: – Hvar er Tjóðveldisflokkurin blivin av? Tað svitast ikki, at í flestu førum stóð Tjóðveldisflokkurin Javnaðarflokkinum við lið, tá tað snúði seg um batar fyri tann vanliga føroyingin. Allir teir batar, sum bygdu upp vælferðarsamfelagið.

MEN seinastu tvey árini hava vit sæð, at Tjóðveldisflokkurin hevur góðtikið politikk og áskoðanir Fólkafloksins, tá tað snýr seg um mál, sum hava við almanna- og verkafólkapolitikk at gera. Eitt tað mest eyðsýnda var, tá Tjóðveldisflokkurin boðaði frá, at hann tók undir við ætlan Fólkafloksins um eina eftirlønartrygging – fólkatrygging – sum fyrst og fremst gagnar teimum vælbjargaðu. Og eisini leyp tað hvøkk á fólk, tá Tjóðveldisflokkurin ikki tók undir við uppskoti Javnaðarfloksins um lóg um arbeiðsumhvørvi.

NÚ eigur andstøðan á Løgtingi at skjóta upp at taka av lógina um oljuavgjald, um Tjóðveldisflokkurin ikki ger tað. Vit hava jú ferð eftir ferð hoyrt, at tað er ikki ov nógv ferð á búskapinum og harafturat er avlopið í landskassanum so stórt á hvørjum ári, at Tjóðveldisflokkurin kundi unt vanliga føroyinginum hesar krónurnar. Vit hava øktar inntøkur í landinum, men higartil hevur tann vanligi føroyingurin ikki merkt nakað til framburðin, uttan tað, at arbeiðið er støðugari nú.

LANDSSTÝRIÐ seinast í áttatiárunum skeyt upp at seta eitt avgjald á olju fyri at tálma tí nógvu búskaparferðini. Peningurin fór í ein oljugrunn, sum Menningargrunnurin, Ídnaðargrunnurin og Húsalánsgrunnurin fyrst og fremst skuldu kunna læna pening úr. Óivað eitt gott endamál tá, men nú er ikki neyðugt við oljuavgjaldinum. Mælt verður tí Tjóðveldisflokkinum til at taka av hetta argandi avgjaldið. Ger Tjóðveldisflokkurin tað, prógvar hann, at hann hevur ikki heilt mist sína sosialu tilvitan.

***Sosialurin***

## Viðmerkingar:

# Áheitan á Føroya Landsstýri

**Skrivið á føroyskum. Tað er best fyri Føroyar!**
Fyri kortum sendi landsstýrismaður eitt skriv til ráðharra í Danmark - á føroyskum - sjálvandi!

Men spurningurin er um tað er so klókt. Tí vandi er fyri, at móttakarin als ikki dugir at lesa brævið.

**Loysingarpolitikkur:**
At loysingarsamgongan nú krevur, at øll onnur skulu lesa føroyskt og helst eisini svara okkum aftur á føroyskum, eru sjálvandi øll her á landi glað ivir. Tí nú má vera liðugt hjá okkum at læra okkum nakað fremmant mál. Vit kunnu hereftir blaka allar útlendskar bøkur burtur, ella brenna tær - spilluna - sum onkur gjørdi fyri nøkrum árum síðani. Øll hini kunnu bert læra seg føroyskt, og tey kunnu byrja við Ð.

**Fíggjarligur møguleiki?**
Møguliga kann mentamálaráðharrin bjarga fullveldiskollapsinum fíggjarliga, við at geva skeið á føroyskum til allar milliónirnar av fólkum, ið nú koma higar at læra seg føroyskt, av tí at landstýrið nú er farið at „kommunikera“ á føroyskum máli á „internationala leikpallinum“.

**Stokkut var gleðin:**
Men „tíverri“ skuffaði Landsstýrið álvarsliga. Í Dimmu ídag er at lesa eitt *skriv frá Føroya Landstýri - á enskum máli*. Tað hevði lyndi at trútna kring eyguni! Ein spyr seg sjálvan, hvat meiningin er? Hví svíkir loysingar landstýrið føroyska málið á slíkan hátt? Mitt í fullveldissvansinum? Er nakað í vegin við at senda eitt skriv til NATO ovastan *á føroyskum?*.

Eg vil so vóna, at ST aðalskrivarin, Kofi Annan, fekk skrivið frá føroya landsstýri á skærum føroyskum máli!

Í hesi loysingartíð kunnu vit rokna við, at tá ið ein danskur ráðharri kann lesa føroyskt, so kunnu bæði NATO ovastin og ST aðalskrivarin enn betur lesa føroyskt. Tí í eini fullveldistíð er danin tann býttasti av teimum trimum. Og uttan nakað kjak stendur føroyingurin omanfyri allar og øll hini.

**Áheitan:**
Sum Sambandsmaður fari eg hervið at heita á Føroya Landstýri um at kommunikera við øll útlendsk lond og stjórnir á føroyskum máli - bæði í skrift og talu. Tað tænir føroysku tjóðini best. Tað hava úrslitini higartil víst.

Vinarliga

**Marjus Dam,**
**løgtingsmaður**

# Løgmaður og varaløgmaður eru líkaglaðir

*um grundlógina, Heimastýrislógina og siðvenjur*

Aftaná tað ússaliga úrslitið av seinastu samráðingunum við danir tykist kókið at verða farið av fullveldisgrýtuni og báðir okkara løgmenn gera nógv fyri at halda lív í málinum og fyri ikki sjálvir at enda í gloymskurnar myrkri. Teir eru fleiri ferðir farnir so langt út um ymisk mørk, at ein kann halda tað vera hættisligt at vera undir teirra leiðslu. Hvat verður tað næsta, teir finna upp á?

Á middegi mikudagin hevði Útvarp Føroya drúgvar samrøður við danskar andstøðupolitikarar og okkara løgmann, sum var staddur í Íslandi. Ein upproyttur løgmaður legði lítið í donsk argumentir um at halda Grundlógina ella føroysk andstøðuargumentir um at halda Heimastýrislógina. Hann segði leyst endurgivið, at tað var ein trupulleiki hjá føroyskum andstøðupolitikarum, at teir hildu seg til Heimastýrislógina. Hetta er sterkur lútur frá einum løgmanni.

Tað er helst neyðugt at minna báðar okkara løgmenn á, at enn er Heimastýrislógin í gildi og henni hava teir at rætta seg eftir soleingi hon er galdandi. Í § 5 í heis Heimastýrislóg stendur: »Føroyska heimaræðið er avmarkað av teimum til einahvørja tíð verandi sáttmálaligu og øðrum internationalum rættindum skyldum. Ríkisvaldi hevur avgerðarrættin í spurningum, sum viðvíkja ríkisins viðurskiftum við útheimin«. So einfalt er hetta. Og hetta skal virðast av okkara politisku leiðarum og gera teir ikki tað, so gera teir seg sekar í lógarbroti og eiga at taka avleiðingarnar av tí.

Tað hevur verið siðvenja, at øll uttanríkismál av týdningi fyrst hava verið løgd fyri løgtingsins uttanlandanevnd antin til kunningar ella til viðgerðar. Kanska gevur hetta grundarlag fyri einum góðum ráði til løgmann ella landsstýrið. Síðani hevur man tosað við ríkisvaldið, áðrenn farið hevur verið til útlendska mótpartin. Soleiðis er ikki longur. Okkara løgmenn vilja ikki hava góð ráð, men venda sær av sínum eintingum beinleiðis til altjóða felagsskapir við málum, sum greitt hoyra undir § 5 í Heimastýrislógini. Her skuldi ikki borið til at umbera seg við vánaligari ráðgeving.

Tað ber ikki til, at løgmaður og varaløgmaður handla sum um vit longu hava fingið fullveldi við nýggjari grundlóg og har Heimastýrislógin er avtikin. Teir hava lovað føroya fólki eina fólkaatkvøðu um hetta málið. Vit eru mong sum halda, at henda atkvøða eigur at vera so skjótt sum gjørligt, so vit kunnu koma víðari í arbeiðinum við at stýra okkara egna landi og við at samskifta við onnur lond. Nógv er steðgað upp í løtuni, tí okkara politisku oddafiskar royna at svimja, men illa duga at halda sær uppi.

Onkur hevur nevnt, at kanska hevur henda amatørkenda atferðin á altjóða pallinum eitt annað endamál enn tað, sum verður borið fram. kanska vilja teir báðir løgmennirnir nú bara hava danir til at gera tað, sum teir sjálvir við fleiri samráðingum ongan veg eru komnir við enn.

Teir gera við hesum dag og dagliga óbótaligan skaða á tann ríkisfelagsskap, sum teir flestu føroyingar framvegis ætla sær at liva í. Tað hoyrist alsamt skilligari á donskum politikarum bæði úr samgongu og andsøtðu, at teir troyttast av tí ókvalificeraða samspæli, teir í løtuni hava við henda partin av ríkinum, so kanska er hjálpin til harrarnar Kalsberg og Hoydal ikki so langt burtur. Sum ikki einaferð, skal hon koma úr landsuðri.

At okkara løgmaður skal lata seg dragsa og trýsta av einum alsamt meira desperatum varaløgmanni er harmiligt. At henda kappingin í at levera diplomatiskar bummarar so skal hava ríkisrættarligar avleiðingar er katastrofalt.

Ein av stabbunum undir okkara framkomna føroyska samfelag er, at vit virða lógir og siðvenjur. At vit hava álit á skrivaðum og óskrivaðum skipanum. Hetta tykist so inngrógvið. So sjálvsagt og líka so ringt at vera fyri uttan sum okkara andadráttur. Tí harmar tað dupult, at okkara politisku leiðarar skulu vera teir fyrstu til at bróta hetta niður og slóða fyri álopum á rættarsamfelagið og okkara demokratisku skipanir. Fyri ikki at tala um umdømi millum okkara grannatróðir. Tað er nokk ikki líka høgt í metum hjá øllum.

***Gøtu 06.09.2000***
**Atli Hansen**

# Tøkk

Vit takka so inniliga fyri sýnda samkenslu, tá ið góði maður mín, pápi, verfaðir og abbi okkara

**DÁNJAL PETERSEN**
**í Skóbúðini**

bleiv heimkallaður til Harran. Tøkk fyri blómutyssir og kransar, og tøkk til tykkum mongu, ið mintust hann við at senda gávu til Zarepta, Harrin signi tykkum øll.

**Alisa**
**Ludvík, Bjørg og Oystein**
**við familjum**



# Tuvalu fekk flagg 189

*Pinkutjóðin, Tuvalu, sum fekk fullveldi í 1978 er nú vorðin limur í ST og hevur fingið flagg sítt vundið á stong uttan fyri ST- høvuðsborgina*



*Tuvalu liggur 1000 kilometrar norðanfyri Fijioyggjarnar*

JOHN JOHANNESSEN

Á samkomu uttan fyri ST høvðusborgina í New York varð flaggið hjá pinkutjóðini, Tuvalu, í hesi vikuni vundið á stong sum tekin um, at Tuvalu nú er limur í ST.

Tuvalu er við sínum 9.000 íbúgvum limaland 189 í felagskapi Sameindu Tjóða.

Undir viðgerðini av Hvítubók varð annars ført fram, at samgongan fór av miðja eftir at fáa føroyska flaggið at veittra sum flagg nummar 189 uttan fyri ST høvðusborgina. Endamálið var, at fullveldið Føroyar skuldi gerast limaland nummar 189 í ST.

### Góðar inntøkur

Høvuðsinntøkurnar fær Tuvalu burtur úr sølu av frímerkjum, men ein stórur partur av inntøkunum koma eisini frá at hýsa telefonsexlinjum.

Harafturat er Tuvalu so heppið at hava eina landakodu á internetinum, sum stórur áhugi er fyri. Internetadressurnar á Tuvalu enda við punktum tv. Hetta hevur landið gjørt sær dælt av og selt rættindini at brúka tv í endanum av internetadressum til sjónvarpsstøðir. TV er nevniliga eisini atjóða styttingin fyri sjónvarp.

Hendan hepna landakodan hevur í øllum førum tryggjað Tuvalu eina inntøku á 4 milliónir dollarar um árið tey næstu tíggju árini. Samanborið við fólkatalið er hetta á leið tað sama, sum føroyingar fáa í blokkstuðuli frá Danmark.

### Bretskt hjáland

Frá tíðliga í fyrru øld og fram til 1978 var Tuvalu bretskt hjáland. Tað var tá kent undir heitinum, Ellice Islands.

Í vídd er Tuvalu við sínum 26 ferkilometrum fjórð minsta landið í heiminum. Minni enn Tuvalu eru Vatikanstaturin, Monaco og Nauru.

Tá talan er um fólkatal, er Tuvalu næst minsta landið í heiminum. Tað er bert Vatikanstaturin, ið hevur færri íbúgvar enn teir 9.000, sum eru á Tuvalu.

Tuvalu liggur 1.000 kilometrar norðan fyri Fiji oyggjarnar í Indiska havinum.

